

*Føroyski fiskiskipaflotin og føroyski fiskimaðurin noyðast nú at venja seg við tankan um, at inntøkutrygd fiskimanna ikki longur fer at koma úr landskassanum*

Mynd: Vilmund Jacobsen

vinnuni, men í fíggjarlógaruppskotinum fyri komandi ár er tilfeingisgjald við í inntøkugrundarlagnum hjá landsstýrinum.

- Líkt er tí til, at tær treytir, sum vinnufeløgini hava sett fyri at vilja yvirtaka skipanina við inntøkutrygd, ikki fara at halda – og gera tær ikki tað, hava vit eina nýggja støðu, leggur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag aftrat.

### 1% av virðinum

Uppleggið hjá vinnufeløgunum er annars, at 1% skal fara av óbýttum landingarvirði, sum verður parturin hjá reiðarum og manningum til nýggja grunnin, sum skal syrgja fyri, at fiskimenn hava eina inntøkutrygd.

Eyðstein Djurhuus vísir á, at eitt vanligt ár liggur avgreiðingarvirðið hjá fiskiflotanum um 2 miljardir krónur, og eitt prosent av hesum gevum 20 miljónir krónur, sum undir vanligum umstøðum er nóg mikið til at dekka tørvin á minstuløn.

- Verður hetta skipanin, verða tað soleiðis tey skip, sum fiska væl, ið koma at gjalda ein størri part inn í grunnin, meðan tey skip, sum fiska minni væl, gjalda minni. Hetta fer soleiðis at virka sum ein útjavningarskipan, sigur hann.

### Steðga misbrúki

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag vísir á, at vinnan á fundi eisini hevur viðgjørt spurningin um møguligt misbrúk av inntøkutrygdini, og í eini nýggjari skipan kemur vinnan sjálv at syrgja fyri, at møguligt misbrúk verður steðgað.

- Tað er eingin loyna, at ein stórur partur av inntøkutrygdini er til útróðrarskipanina, og her vísir tað seg, at parturin broytist lítið – antin tað gongur væl ella minni væl at fiska. Øll vinnufeløgini eru samd um, at eftirlitið í eini nýggjari skipan skal skerpast, og hesa áskoðan hevur Meginfelag Útróðrarmanna eisini, sigur Eyðstein Djurhuus.

Sosialurin kann leggja aftrat, at eingin peningur er settur av til inntøkutrygd í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011, men uppskot um at avtaka inntøkutrygdina kom annars í tingið saman við fíggjarlógaruppskotinum.

### Nýtt lógaruppskot

Inntøkutrygd fiskimanna kom í 1947.

Tey fyrstu árini fíggjaði vinnan sjálv hesa skipan, men í 1969 endaði hon í landskassanum.

Nú skal inntøkutrygdin so úr aftur landskassanum.

Eyðstein Djurhuus veit at siga, at eitt lógaruppskot um eina nýggja skipan kemur úr Fiskimálaráðnum um nakrar vikur.

- Kjarnin í tí uppskotinum er, at inntøkutrygdin skal vera uttan fyri landskassan, og partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum eru Reiðarafelagið og manningarfeløgini, skulu umsita hesa skipan, leggur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag aftrat.

Ein grunnur verður stovnaður við stovnsfæi.

Enn eru ikki allar súður syftar um nýggju skipanina við inntøkutrygd, og spennandi verður at fylgja við, hvussu leikur fer.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Veiðan hjá føroysku línuskipunum undir Íslandi hevur verið hampiliga góð seinastu túrarnar*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Góðir íslandstúrar hjá línuskipunum

**FISKIVINNA** Tveir teir seinastu túrarnar undir Íslandi hevur línuskipið Kambur fiskað tilsamans 400.000 pund, sum er góð línuveiða

Vilmund Jacobsen

Í dag landa tvey línuskip á Toftum. Kambur hevur 193.000 pund, og Stapin hevur sløk 128.000 pund. Bæði skipini hava verið undir Íslandi. Kambur hevur havt 12 setur, og Stapin hevur havt 9.

Á túrinum undan hesum vóru somu skip eisini undir Íslandi. Tá hevði Kambur 206.000 pund, sum er ein góður túrur, meðan Stapin hevði umleið 170.000 pund, sum eisini er ein góður túrur.

Meginparturin av veiðini hjá línuskipunum undir Íslandi er toskur og brosma, men hendan túrin hevði Stapin eisini væl av blálongu.

### Veiða í tølum

Taka vit veiðina hjá Kambi í morgun, hevur skipið 86.000 pund av brosmu, 53.000 av toski, 9.000 av lira og 1000 pund av kongafiski.

Av veiðini hjá Stapanum í morgun, eru góð 55.600 pund toskur, 35.000 brosma, 27.000 blálonga, og 8.000 pund er liri.

Á Landingarmiðstøð Føroya á Toftum vænta tey eisini línuskipið Vesturhavið hesa vikuna, men í morgun var ikki greitt, nær skipið kemur inn at landa.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Turt gólv hjá Kongshavn

Líkt er ikki til, at hetta verður nøkur stór vika á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará.

Í morgun, tá vit frættu, lá einki skip til landing, og gólvini inni á landingarmiðstøðini vóru turr.

- Sum er, hevur einki skip boðað frá landing, men vit vænta, at okkurt verður, sum vikan líður, frættu vit í morgun.

Upsaveiðan hjá partrolarunum hevur verið misjøvn, men yvirhøvur smálig tað mesta av summarinum.

Væntandi hevur verið, at upsafiskiskapurin fór at taka seg uppaftur í heyst, men soleiðis hevur ikki verið higartil.

Onkrir partrolarar hava tó gjørt hampiliga góðar túrar og hava fingið upp í lastina, men sum heild høvdu menn vónað, at fiskiskapurin gjørdust meiri støðugur og góður.

*vilmund@sosialurin.fo*